# Hví bakkaði Hans Pauli Strøm?

**Annita á Fríðriksmørk hevur sett løgmanni skrivliga fyrispurning viðvíkjandi setan av lærara við frítíðarskúlan á Tvøroyri. Hon vil hava at vita, um løgmaður gav landsstýrismanninum boð um at bakka frá einari rættari avgerð**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Heldur løgmaður, at tað er nóg mikið at geva landsstýrismanninum eina átalu í einum so álvarsligum máli, sum málið viðvíkjandi setan av leiðara við frítíðarskúlan á Tvøroyri?

Hetta spyr Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna Tjóðveldisfloksins, løgmann í einum skrivligum fyrispurningi. Tingkvinnan spyr eisini, um løgmaður hevur havt beinleiðis samskifti við býráðslimir á Tvøroyri um nevndu setan. Hon vil eisini hava at vita, um løgmaður hevur biðið landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at bakka frá støðuni ella um at broyta avgerðina, tá hesin hevði boðað frá, at skúlin varð stongdur, um viðurskiftini viðvíkjandi setan av leiðara við frítíðarskúlan á Tvøroyri ikki vóru fingin í rættlag.

Annita á Fríðriksmørk spyr eisini løgmann, um hann hevur røkt sína eftirlitsskyldu viðvíkjandi handfaringini av málinum um setan av leiðara við frítíðarskúlan á Tvøroyri, og um hann hevur havt møguleika at røkt sína eftirlitsskyldu viðvíkjandi handfaringini av málinum um setanina.

Annita á Fríðriksmørk vísir á, atl øgmaður í august 2005 hevur givið landsstýrismanninum í almanna og heilsumálum eina átalu fyri handfaringina av málinum viðvíkjandi setan av leiðara við frítíðarskúlan á Tvøroyri.



- Málið byrjaði fyri einum ári síðani, tá ið Tvøroyrar býráð tók endaliga avgerð um at seta ein lærara við frítíðarskúlan á Tvøroyri. Hendan avgerð var tikin hóast ein skikkaður pedagogur søkti, og hóast lógin greitt krevur, at leiðarin skal verða pedagog, sigur Annita á Fríðriksmørk.

- Tað, sum loypti undran á fólk var, at landsstýrismaður fyrst røkir sína skyldu sum eftirlitsmyndugleiki og krevur av Tvøroyrar býráð at hesi fáa viðurskiftini í rættlag. Gera tey ikki tað, verður skúlin stongdur, til viðurskiftini eru fingin í rættlag. Men tað løgna við gongdini var, at hóast hann her ger rætt, so valdi hann bráddliga av alment ókendum orsøkum at broyta støðu og góðtók nú, at viðurskiftini viðvíkjandi setanini av leiðara ikki vórðu fingin í rættlag, sigur tingkvinnan.

Hon vísir eisini á, at málið viðvíkjandi setan av leiðara við frítíðarskúlan á Tvøroyri hevur løgtingsins umboðsmaður viðgjørt og gevur umboðsmaðurin gongdini í málinum lemjandi kritikk. Hann skrivar m.a soleiðis í síni niðurstøðu av kanningini:

*»Samanumtikið haldi eg talan vera um sera álvarslig brot á dagstovnalógina og grundleggjandi reglur í fyrisitingarlógini. Hendan málsviðgerðin hevur verið so óforsvarlig, at eg kann ikki annað enn geva kommununi eina sera álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum málinum.*

*Landsstýrismaðurin fer inn í hetta málið og hóttir við at steingja frítíðarskúlan, men tá á stendur bakkar hann.«*

- Tann stóri spurningurin er tí, hví bakkar landsstýrismaðurin eftir, at hann fyrst ger tað, sum rætt var, spyr Annita á Fríðriksmørk. Hon dugir ikki at síggja nakra aðra ørsøk til at landsstýrismaðurin bakkar frá einari rættari avgerð, annað enn at boð eru komin úr hægri fyrisitingarligum stað.

- Er hetta so, kann orsøkin bert verða at løgmaður hevur verið inni í málinum og fingið landsstýrismannin í almanna og heilsumálum at broyta avgerðina. Er hetta so, er hetta sjálvandi álvarsamt og eigur at koma alment fram, sigur Annita á Fríðriksmørk.

# Svensku forsætisráðharrahjúnini koma fríggjadatgin

**Svensku forsætisráðharrahjúnini vitja m. a. í Norðoyggjum, í Suðuroy og í Havn. Fríggjadagin fara tey eisini ein túr undir Vestmannabjørgini**

VITJAN

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fríggjadagin koma svenski forsætisráðharrin Göran Persson og frú Anitra Steen á almenna vitjan. Forsætisráðharrahjúnini lenda í Vágum klokkan 15.50, har løgmaður Jóannes Eidesgaard og frú Anita Eidesgaard taka ímóti.

Av flogvøllinum verður koyrt til Oyragjáar, haðani siglt verður fram við Vestmannabjørgunum til Klaksvíkar. Í Klaksvík taka borgarstjórin Steinbjørn O. Jacobsen og frú Suniva Jacobsen ímóti. Vitjað verður á Kósini, har forsætisráðharrin og frú fáa møguleika at kunna seg við føroyskt vinnulív.



*Svenski forsætismálaráðharrin og frú Anitra Steen koma fríggjadagin á almenna vitjan í Føroyum*

Um kvøldið eru løgmaður og Klakvsíkar býráð vertar við døgurðan í Skálanum.

Leygardagin verður farið til Suðuroyar, har gingið verður í Hvannhaga. Á middegi fara løgmaður og forsætisráharrin at hava ein arbeiðsmorgunmat í Listaskálanum. Eftir hetta verður vitjað í Norðurlandahúsinum, og seinnapartin verður fundur við Javnaðarflokkin í Miðlahúsinum. Eftir fundin eru sviar, búsitandi í Føroyum, og pressan boðin at hitta forsætisráðharran við frúu.

Sunnumorgunin verður vitjað í Tinganesi og síðani fer Göran Persson á fund við Søren Christensen, ríkisumboðsmann.

Almenna vitjanin hjá svenska forsætisráðharranum og frú endar um middagsleitið, tá farið verður úr Vágunum.



*Gongst eftir vild, kann Bjarni Djurholm leggja fram uppskot um føroyska granskingarpark longu í hesi tingsetuni*

# 90 milliónir til gransking

**Vinnumálaráðið hevur nú latið úr hondum tilmæli um, hvussu ein føroysk granskingarpark kann skipast. Ætlandi skal fyrsti parturin av hesi takast í nýtslu longu um tvey ár**

GRANSKING

*Jákup Mørk*

Við støði í sonevndu strategi 2015 ætlanini hjá landsstýrinum hevur Vinnumálaráðið nú latið úr hondum tilmæli um, hvussu ein føroysk granskarapark kann setast á stovn.

Visiónin í hesum er, at granskaraparkin skal hava ein miðsavnandi leiklut í samband við kommersialisering av úrslitum innan biotøkni og biokunning, og á tann hátt vera eitt markamóti millum verandi vinnu, hægri nám, granskingarumhvørvi og íverksetarar. Eisini er vónin, at ein slík park kann stuðla vinnuligari menning og nýhugsan. Virka sum sameiningarliður millum gransking og vinnu, soleiðis at ein sonevnd synergi-effekt verður uppnádd, og ikki minst at virka sum ein magnetur til bæði føroyskt og útlendskt knowhow.

Bio- og kunningartøkni verða í dag mett sum størstu vakstrarøkini í heiminum innan vinnuliga gransking, og tí fevnir tilmæli um eina føroyska granskingarpark í fyrstu atløgu serstakt um hesi evni. Samstundis eru hesi evni eisini tey, sum verða mett av hava størstu vakstrarmøguleikarnar í Føroyum.

## Nýtt partafelag

Í tilmæli sínum mælir vinnumálaráðið til, at ein komandi føroysk granskingarpark verður skipað við lóg sum alment partafelag. Uppgávan hjá tí almenna verður so í fyrsta lagi at játta felagnum nóg mikið av pengi til fyrireiking og bygging av eini slíkari park, umframt at felagið fyrstu árini eisini fær játtan, sum kann fíggja eitt ætlað rakstrarundirskot hesi fyrstu árini.

Samanlagt skal játtanin til hetta vera 90 milliónir, stendur tað til vinnumálaráðið. 7 mió kr. til fyrireiking. 70 mió kr. til bygging. Og seinastu 13 milliónirnar skulu so verða grundarlagið undir neyðugu rakstrarfíggingini fyrstu fýra árini. Hartil verður í byrjunarfasuni neyðugt við játtan til eini trý granskingarprofessorat, og verða hesai mett at kosta 5 mió kr. um árið fyrstu fimm árini.

Fysisku karmarnir kring parkina skulu eftir ætlan vera við til at menna granskingarumhvørvið. Tað vil siga, at talan verður um ein nýmótans bygning við neyðugum hentleikum.

Vinnumálaráðið mælir til, at lógaruppskotið um eina føroyska granskingarpark verður orðað í næstum, og at uppskotið verður lagt fyri Løgtingið í inniverandi tingsetu. Gongst eftir ætlan, verður fyrsta byggistig av granskingarparkini klárt at taka í nýtslu longu í 2007.

Sambært OECD eru gransking, menning og endurnýggjan avgerandi í royndunum at betra um kappingarførið hjá vinnuni - - og harvið eisini livistøðinum í einum landi.